## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, minkandi niður í lot av ymsum ættum. Um morgunin vátaslettings- ella kavaælingur og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum kavi. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt. Hitin um frostmarkið. Tollaksmessudag veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av útsynningi og regn. Lýggjari.

# Í morgin kemur Jólaskipið á Havnina

**Leygardagin seinnapartin kl 15 kemur Jólaskipið á Havnina. Skipið leggur í Vágsbotni – men kanska verður lagt at í Nólsoy at heilsa upp á stór og smá á vegnum til Havnar**

### JÓLASTÁKAN

– Hvussu verður jólaveðrið í ár? Nógv spyrja og royna at meta um, hvussu álítandi 5 daga forsøgnin er.

3. sunnudag í advent var rættiligt vetrarveður, høgætt við nógvum vindi og kava og hálka. Hóast hetta høvdu nógv, bæði børn og vaksin, leitað sær niðan til Hoyvíkar. Tey vaksnu fyri at minnast aftur á, hvussu jólini kundu vera, tá tey vóru børn, og tey yngru og børnini fyri at forvitnast, tí ommur og abbar siga altíð, at jólini tá í tíðini vóru nógv betri enn nú. Hugnaligt var, og børnini komu fram á nógvar vætrar og nissur, sum stákaðust í kovunum.

Men hetta vetrarnosið vardi stutt. Nú er næstan aftur so heitt sum um summarið. So hvussu verður, man jólamaðurin minnast til, at tað skjótt eru jól, og at øll børn í Føroyum bíða eftir honum? Tíbetur hevur veðrið einki at siga hjá jólamanninum. Hjá honum ræður um at verða liðugur áðrenn jól, og tað er hann nú.

Jólamaðurin í Havn hevur sent boð eftir jólaskipinum og er á veg til Havnar. Hann hevur eisini sagt, at um viðrar leggur jólaskipið at í Nólsoy á veg til Havnar at heilsa upp á børnini har í bygdini.

Seinastu vikuna áðrenn jólaaftan hendir so nógv í Havn, at jólamaðurin í ár hevur bjóðað fleiri jólamonnum við sær, og teir koma allir við skipinum leygardagin 20. desember. Teir ætla at leggja at í Vágsbotni longu kl. 3, tí børnini og tey flestu vaksnu hava frí leygardag. Tá er heldur ikki so myrkt, so teir fara betri at síggja tey børnini, sum koma oman í Vágsbotn at taka ímóti teimum.

Úr Vágsbotni fara teir ein túr niðan í Grasagarð at heilsa upp á børn, sum eru komin saman har at syngja fyri teimum. Men teir verða nokk ov seinir at síggja mumi-trøllini spæla sjónleik í lítla jólahúsinum í Grasagarði. Men so fara teir at geva sær stundir at spáka gjøgnum býin at heilsa uppá stór og smá, havnarfólk og jólagestir.

Býráðið hevur sum vant pyntað við ljósketum og stjørnum, og jólatræið á Vaglinum er eitt tað størsta og vakrasta nakrantíð.



*Jólaskipið við jólamonnunum leggur at í Vágsbotni, har stór og smá fara at taka ímóti, áðrenn leiðin hjá jólamonnunum gongur niðan í býin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tónleikur og sangur verður hvønn dag. Sjálvt um onkur av bodnu jólamonnunum mugu víðari, so verða nakrir eftir, og teir ætla sær at vitja í miðbýnum hvønn dag til jólaaftan.

– Jú her er gott at vera! Og úr miðbýnum ynskja vit øllum eini gleðilig jól, siga tey á Kunningarstovuni, ið skipa fyri hesum jólatiltaki.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷11 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷7 |
| Ammassalik | – |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 7 |
| Tromsø | ÷5 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷8 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 14 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | – |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 978 hPa. eystan fyri Ísland fer eystureftir og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 1006 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer móti Íslandi.




Lágtrýstið við Ísland fer í landsynning og dregur kalda luft av norði móti Føroyum. Tí verður frostveður komandi dagarnar, men Tollaksmessudag verður væntandi aftur lýggjari.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/12 kl. 06⁰⁰– 18/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 17/11 kl. 06⁰⁰–18/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 57,1 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

16. desember: Seinna kvarter
22. desember: Mánin næstur jørðini
23. desember: Tendring

Kelda: Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 19. des | 02.34 | 14.56 | 01.34 | 13.56 | 01.49 | 14.11 | 04.34 | 16.56 | 05.34 | 17.56 | 00.49 | 13.11 | - | 12.11 | 02.49 | 15.11 | 03.49 | 16.11 | 02.19 | 14.41 | 03.34 | 15.56 |
| 20. des | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 02.34 | 14.58 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 01.34 | 13.58 | 00.34 | 12.58 | 03.34 | 15.58 | 04.34 | 16.58 | 03.04 | 15.28 | 04.19 | 16.43 |
| 21. des | 04.09 | 16.35 | 03.09 | 15.35 | 03.24 | 15.50 | 06.09 | 18.35 | 07.09 | 19.35 | 02.24 | 14.50 | 01.24 | 13.50 | 04.24 | 16.50 | 05.24 | 17.50 | 03.54 | 16.20 | 05.09 | 17.35 |
| 22. des | 05.03 | 17.31 | 04.03 | 16.31 | 04.18 | 16.46 | 07.03 | 19.31 | 08.03 | 20.31 | 03.18 | 15.46 | 02.18 | 14.46 | 05.18 | 17.46 | 06.18 | 18.46 | 04.48 | 17.16 | 06.03 | 18.31 |

5 707265 100050 >